## Nýtt Real-met til Raul

Raul Gonzales Blanco setti um vikuskiftið enn eitt nýtt met fyri Real Madrid. Undan dystinum móti Valladolid hevði Raul longu metið sum mest skorandi spælarin í søguni hjá felagnum, og sunnudagin gjørdist hann eisini tann, sum hevur spælt flestar dystir fyri felagið. Undan dystarbyrjan fekk Raul serstakt steyp handað frá felagnum, og hann helt dagin við at skora tvey av málunum hjá Real Madrid í 4-2 sigrinum. Og dagurin gjørdist neyvan verri, tá tað stóð greitt, at Barcelona misti síni fyrstu stig við málleysum javnleiki móti Valencia.



## Santos leingir við EB/Streym

Alex Jose dos Santos og EB/Streymur hava skrivað undir nýggjan sáttmála, soleiðis at brasiliumaðurin eisini umboðar felagið í 2010. Hesum boðaði EB/Streymur frá á heimasíðu felagsins fríggjdagin. Tað merkir, at vinstri bakkurin nú kann fyrireika seg til næsta kappingarárið í felagnum. Hann kom til EB/Streym frá B36 undan júst farna kappingarárið, men tað hevur verið svingandi við spælitíðini hjá Santos, sum annars av mongum verður mettur at vera millum landsins bestu á sínum plássi.

### H71-Kyndil 29-25 (14-13):

# Stórskjúttin feldi Kyndil

**Við 14 málum var eingin ivi um, at Poul Kjartan Dam var dagsins maður hjá H71 sunnudagin. Fýra dystir og 36 mál standa nú á visitkortinum hjá láminum**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Seinastu tvey árini ella so hevur Poul Kjartan verið fastur partur av hópinum hjá H71, men tað er ikki fyrr enn nú, at hann veruliga hevur traðkað í karakter sum stórskjútti. Og tá tað nú skuldi vera, so hví ikki eisini lata tað vera við manér.

Fyrri hálvleikur var mest sum eitt one-man-show frá Kjartani, sum átti ikki færri enn 10 av teimum 14 málunum, sum H71 setti í kassan. Gaman í var helmingurin eftir brotskast, men tað nart ikki veruleikan, at talan er um ein spælara við meira enn vanligum krúti í arminum.

Mest sum hvør tann einasta skotroynd tók í onkran part av træverkinum, áðrenn kúlan fann meskarnar, og í Kyndli mundu teir gruna um, hvat teir skuldu gera við hendan partin av spælinum.

Ikki tí. Kyndil hevði eisini aðrar trupulleikar við sínum spæli, og teir kundu bara takka Magnusi Matras í málinum fyri, at munurin ikki gjørdist enn størri, og eina lítla løtu eftir steðgin hótti yndil eisini.

Tað gjørdist tó ikki meira enn næstan hj´ateimum grønu, sum ongan tíð av álvara høvdu fatur í dystinum. Hóast eina útvísing vann H71 seg frá 17-17 upp á 20-18, og eftir hetta hvarv spenningurin at kalla. Teir grønu vildu heldur nýta tað, sum eftir var av orku, til at keglast við dómaraparið, meðan hoyvíkingar uttan stórvegis hóvasták koyrdu sigurin heim.

### Hevur tikið møguleikan

Tá dysturin millum H71 og Kyndil var av, fingu vit orðið á stórskjúttan hjá hoyvíkingum. Og vit spurdu hann, hvussu tú brádliga fer frá at vera marginalspælari til at vera tann maðurin, sum bumbar flestu kassarnar inn.

- Tá vit høvdu Kára Durhuus og Hannis Wardum sum venjara, hevði eg fast pláss. Men síðani komu aðrir til. Halgir byrjaði aftur, og Danny Syhler kom eisini við, og so varð minni pláss til mín. Nú havi eg fingið pláss og spælitíð aftur, og tað hevur bara gingið væl.

So tað snýr seg bara um álit frá venjaranum?

- Tað kanst tú gott siga. Men tað er í øllum førum so, at eg nú fái betri møguleika at gera um meg.

Og sigurin í dag vísir eisini, at tit eru við at finna fram á rætta stevið aftur?

- Tað eru vit. Stór útskifting hevur verið í hópinum, og vit hava eitt øgiliga ungt lið. Móti Neistanum taptu vit tó akkurát, og móti StÍF varð talan um eitt lítið skrædl. Men bæði móti hoyvíkingum og í dag vístu vit, at vit kunnu vera við í kappingini um finaluplássini, staðfesti nýggi toppskjúttin í føroyskum manshondbólti.



Poul Kjartan Dam hevur verið ein brandur fyri H71 í ár. Í álopinum er eingin, sum tekur hann, og eisini í verjupartinum ger hann sína skyldu
Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA

H71-Kyndil 29-25 (14-13)
**10 min:** 5-3
**20 min:** 8-8
**40 min:** 18-18
**50 min:** 25-21
**Málskjúttar**
**H71:** Poul Kjartan Dam 14(5), Dánjal Tórgarð 5(1), Janus Sørensen 3, Tróndur Vatnhamar 3, Rógvi Sørensen 2, Hans Kári Hansen 1
**Kyndil:** Bárður Johannesen 8, Josef Abrahamsen 7(1), Høgni Klein 5, Julian Johansen 2, Hans Áki Dal-Christiansen 1, Ken Zachariasen 1, Kristoffur Kristoffersen 1
**Brotskøst:** H71 7, Kyndil 2
**Útvísingar:** H71 5, Kyndil 1
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

## Levi og Tór-Ingar til HB

**Levi Hansssen og Tór-Ingar Akselsen spæla við HB komandi ár. Tað varð kunngjørt á ársveitsluni leygarkvøldið, har tað eisini er váttað, at fleiri spælarar hava longt sín sáttmála**

Veitslulagið var í toppi í HB-húsinum leygarkvøldið.

Árs- og FM-veitsla var á skránni, og høvið varð sum vant eisini nýtt til at siga nakað um, hvussu hópurin hjá besta mansliðnum fór at síggja út komandi ár.

Her fær felagið tilgongd av Levi Hanssen úr EB/Streymi og Tór-Ingar Akselsen úr 07 Vestur.

Levi, sum hevur sína fótbóltsuppaling í B36, hevur seinnu árini spælt við Skála og EB/Streymi. Tór-Ingar hevur sína uppaling í Vágum, men hann hevur áður spælt fyri HB. Eitt nú í 2003, tá hann var ein sera týðandi partur av liðnum, sum við Frank Skytte sum venjara, vann gullið.

Eisini er nú staðfest, at fleiri spælarar hava longt sáttmáaln við felagið. Fróði Benjaminsen, sum í ár varð valdur ársins spælari í føroyskum fótbólti, hevur skrivað undir trý ára sáttmála, og eisini hava Milan Kuljic og Marcyn Dawid longt sínar sáttmálar við tveimum árum.

Einki varð tó sagt um, hvør verður venjari hjá felagnum. Tað hevur annars ljóðað, at Sigfríður Clementsen er heitasta navnið í so máta, nú ein avloysari skal finnast til Sámal Erik Hentze, men enn mugu HB-fjepparar brynja seg við toli á tí økinum.

-mørk